# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 25. oktober 2011, kl. $19^{00}$.

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Bárður Poulsen boðað frá, at honum berst frá møta á fundinum vegna sjúku, og tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen hevur í telefonsamrøðu við kommunuskrivaran tann 25. oktober 2011 fingið fundarboð.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslimi.

Karl A. Olsen, borgarstjóri, heitti á Bygdarráðið um at loyva, at eitt nýtt mál verður sett á skránna. Áheitanin varð einmælt samtykt. Málið verður sett á skránna sum mál 43 niðanfyri, og viðgjørt fyri afturlatnari hurð.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 42**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn frá Saron um stuðul til barnaarbeiði.
J.nr. 2009-401
Nevndin mælir til at játta 5.000 kr. til barnaarbeiði hjá Saron.

**Viðv. 42**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Øssur Christiansen